Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 07.03.2024
Mál nr.: 23/25586
Málsviðgjørt: MJ/JH

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	Í løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 2. Virkisskráin skal: 1-2)… 3) gera grundardátur tøkar, sbrt. §§ 15 og 16.	**1.** § 2, nr. 3, verður orðað soleiðis: "3) gera grundardátur tøkar, sbrt. § 15."
§ 3. Ein løgfrøðilig eind skal í hesi løgtingslóg skiljast sum: 1) Ein likamligur persónur, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr., ella sum er arbeiðsgevari.	**2.** Í § 3, nr. 1, verður "og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr.," strikað.
§ 8. Fyri løgfrøðiligar eindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni: 1-11) ... 12) Starvsfólkatal. 13- 16) …	**3.** § 8, stk. 1, nr. 12 verður strikað. Nr. 13-16 verða eftir hetta nr. 12-15.

§ 8. Fyri løgfrøðiligar eindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni: 1) V-tal. 2) Navn og hjánøvn. 3) Virkisháttur. 4) Byrjanardagfesting. 5) Møgulig uppathaldsdagfesting. 6) Adressa. 7) Navn, adressa og p-tal hjá stjórn. 8) Navn, adressa og p-tal hjá nevnd. 9) Grannskoðari. 10) Geiri. 11) Vinnugrein og møgulig hjávinnugrein. 12) Starvsfólkatal. 13) F-tal fyri atknýttar framleiðslueindir. 14) Samskiftisupplýsingar. 15) Møguligt skrásetingarnummar. 16) Mvg skylda.	**4.** Í § 8, stk. 1 verða sum nr. 16 og 17 sett: "16) Eigaraupplýsingar. 17) Roknskaparár."
§ 8 *Stk. 2.* Fyri framleiðslueindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni: 1-8) … 9) Starvsfólkatal 10-11) ...	**5.** § 8, stk. 2, nr. 9 verður strikað. Nr. 10 og 11 verða eftir hetta nr. 9 og 10.
§ 8 *Stk. 3.* Fyri undirframleiðslueindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni: 1-8) … 9) Starvsfólkatal. 10) …	**6.** § 8, stk. 3, nr. 9 verður strikað. Nr. 10 verður eftir hetta nr. 9.
§ 15 *Stk. 2.* P-tøl skulu bert útflýggjast úr Virkisskránni til almennar stovnar, fevndir av § 1, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg.	**7.** § 15, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Privat kunnu bert fáa útflýggjað p-tøl úr Virkisskránni samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum."
§ 15 *Stk. 3.* Dagføring av persónsupplýsingum sbrt. § 8, stk.1, nr. 7 og 8 og § 8, stk. 2, nr. 7, steðgar 10 ár eftir, at viðkomandi persónur gerst óvirkin í eindum, skrásettar í Virkisskránni.	**8.** § 15, stk. 3-5 verður strikað. Stk. 6 verður eftir hetta stk. 3.

Stk. 4. Grundardátur um tal av starvsfólki skulu bert í støddarbólkum útflýggjast til privat. *Stk. 5.* Almennir stovnar, ið hava fingið grundardátur úr Virkisskránni, skulu í sambandi við víðarigeving av hesum lúka ásetingar í stk. 4 og 6 og § 16, stk. 2.	
§ 16. Við fráboðan kunnu løgfrøðiligar eindir tilskila sær lýsingavernd. Tað merkir, at uttan nágreiniliga heimild í lóg, í reglum við heimild í lóg ella samtykki, kunnu grundardátur um viðkomandi eind í Virkisskránni ikki nýtast í samband við marknaðarføring. *Stk. 2.* Grundardátur, ið eru móttiknar við frámerki um lýsingavernd, skulu ikki nýtast ella víðarigevast í ósamsvari við stk. 1. **§ 17.** Tann, ið tilætlað ella av grovum ósketni brýtur ásetingina í § 16, stk. 2, verður revsaður við sekt. *Stk. 2.* Løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært kapitli 5 í revsilógini.	**9.** §§ 16 og 17 og yvirskriftirnar yvir §§ 16 og 17 verða strikaðar.